



## Grannastevna

Samb. Lóg nr. 170 frá 18.05.1937 fyri Føroyar um grannastevnu v.m., verður boðað frá, at grannastevna fyri markatalsbygdina Skúgvi verður ætlandi

**týsdagin 11. mars 2003 kl. 10.00**
**í Skúgvi**

Innkomið mál: Fyribyrging móti at rotta og mýs verða flutt út í Skúvoynna.

Málið verður viðgjørt og atkvøtt sambært Lóg nr. 170 frá 18.05.1937 fyri Føroyar (grannastevnulógini).

Møtir og atkvøður onkur fyri annan, ið hevur atkvøðurætt, krevst fulltrú frá viðkomandi, dagfest og undirskrivað av tveimum vitnum.

Á Sandi 29. januar 2003

**Ingibjørn Eldevig**
Sýslumaður

## Grannastevna

Samb. Lóg nr. 170 frá 18.05.1937 fyri Føroyar um grannastevnu v.m., verður boðað frá, at grannastevna fyri markatalsbygdina Skarvanes verður ætlandi

**mánadagin 10. mars 2003 kl. 14.00**
**á sýsluskrivstovuni á Sandi**

Innkomið mál: umbøn um viðgerð og broytan av býtinum av hegn- og garðaskylduni á Skarvanesi.

Málið verður viðgjørt eftir Lóg nr. 171 frá 18.05.1937 fyri Føroyar, (girðingarlógin) og atkvøtt samb. Lóg nr. 170 frá 18.05.1937 fyri Føroyar (grannastevnulógini).

Møtir og atkvøður onkur fyri annan, ið hevur atkvøðurætt, krevst fulltrú frá viðkomandi, dagfest og undirskrivað av tveimum vitnum.

Á Sandi 29. januar 2003

**Ingibjørn Eldevig**
Sýslumaður

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg

ítróttur
Nr. 21 • fríggjadagur • 31. januar 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Fáar broytingar




*Birgir Enghamar heldur fram sum formaður í HB*

**HB og P/F Havnar Fótbóltur høvdu aðalfund mikukvøldið, men var nakar, sum hevði roknað við stórtíðindum, so vóru hesi ikki at fáa haðani**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tey bæði feløgini hjá HB. Móðurfelagið, HB, og partafelagið Havnar Fótbóltur, sum rekur fyrstudeildarfótbóltin í felagnum, høvdu aðalfund mikudagin.

Sum skilst, so var talan í allar mátar um ein fund av tí heilt siðiliga slagnum. Formaðurin í HB, Birgir Enghamar, sum eisini er nevndarformaður í partafelagnum, varð afturvaldur, og tá vit hittu hann á orðið hóskvøldið, segði hann, at talan var um ein av teimum heilt friðarligu fundunum.

- Eini 30-40 fólk mundu vera til staðar, og uttan nakað stórvegis hóvasták vórðu føstu punktini á skránni gingin ígjøgnum, sigur Birgir.

Sum heild sigur formaðurin, at talan ikki var um nøkur einstøk mál, sum fingu serliga drúgva viðgerð. Roknskapurin fyri feløgini varð sjálvandi gjøgnumgingin, og uttan at vilja greina út, hvussu úrslitið var hjá hvørjum parti, so sigur formaðurin, at samanlagt var alt oman fyri vatnskorpuna. Tað vil við øðrum orðum siga, at fyri bæði móðurfelagið og partafelagið var samlaða úrslitið nakað oman fyri nullið.

### Nevndarbroytingar

Nakrar smærri broytingar í nevndarsamansetingini í feløgunum hendi tó á aðalfundinum.

Í HB stóðu Niels Juel Arge og Finn Ludvig fyri valið, og teir vórðu báðir afturvaldir. Tiltakslimur hetta seinasta árið hevur verið Elin Christiansen, men nú hon ikki ynskti at stilla uppaftur, varð Alexandur Gaard Joensen valdur í hennara stað.

Í partafelagnum hevur nevndin seinastu árini talt seks persónar, men hetta varð broytt á aðalfundinum. Niels Christian Nolsøe og Kaj Leo Johannesen hava báðir tænt felagnum í nógv ár, men fyri báðar er tó galdandi, at teir í løtuni ikki hava umstøður at røkja nevndarsessir sínar nóg væl, og tí høvdu báðir boðað frá, at teir ikki tóku við afturvali.

Viðtøkur felagsins geva tó rúmd fyri, at nevndin er mannað av fýra til seks persónum, og tí vórðu eingir nýggir nevndarlimir valdir.

### Eingi stórtíðindi

Ivaleyst hevði onkur av teimum, sum høvdu leitað sær á aðalfundin, vónað, at stórtíðindini av onkrum slag viðvíkjandi leikarahópinum vóru at frætta. Men hesi fóru í øllum førum vónbrótin heim.

Størsti spenningurin man í løtuni snúgva seg um, hvørt Jón Rói Jacobsen verður avhendaður til Brøndby ein av komandi døgunum, men hesum viðvíkjandi var einki at frætta á fundinum. Heldur ikki varð tosað nakað um, hvørjir nýggir leikarar eru ávegis til felagið. Tað hevur annars ljóðað, at Símuhn Eliasen og Carsten From – hesin seinni er í hópinum hjá FC Midtjylland – eru ávegis til felagið, men hetta tykist formaðurin hava lítlan hug at gera viðmerkingar til. Vanliga tekur hann til, at einki er avgjørt, fyrr enn alt er avgjørt, so hóast talan hevur verið um samband millum partarnar, so eru hetta ikki mál, sum eru klár at almannakunngera í løtuni.



*Tað var heldur eingin ivi í seinnu hálvfinaluni, tá Kyndil staðfesti sítt pláss í steypafinaluni*

KÍF III-Kyndil 22-37

## Kyndil í finaluni

**Kyndil staðfesti sítt pláss í steypafinaluni, tá teir uttan stórvegis hóvasták vunnu enn ein stórsigur á triðjudeildarliðnum hjá KÍF**

COCA-COLA KAPPINGIN, MENN
*Jákup Mørk*

Tað var mest sum longu ein staðfesting undan seinnu hálvfinaluni móti triðjudeildarliðnum hjá KÍF, at Kyndil var í steypafinaluni. Sum væntað, so endaði tann dysturin við stórsigri til Kyndil, og í seinna dystinum vóru ongan tíð nakrar sum helst ábendingar um, at nakað skuldi broytast í so máta.

Kyndil vann dystin 37-22, og sum skilst á lagnum, so var alla tíðina sjónligt, at stórur munur var á liðunum báðum.

Við hesum hevur Kyndil endaliga staðfest sær rættin til pláss í finaludystinum, har teir skulu spæla móti StÍF.

### Dysturin í tølum

**KÍF III – Kyndil 22-37**
Kyndil víðari við samanlagt 71-45
Dómaraseðil fyri dystin var tíverri ikki tøkur við evstamark okkara.